HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tíðindaskriv

**Byggiætlan fyri Landssjúkrahúsið framløgd**

*Næsta útbygging av Landssjúkrahúsinum fevnir eisini um nýggjan psykiatriskan depil, sum skal byggjast niðanfyri verandi høvuðsbygning, sambært dagførdu byggiætlanini fyri Landssjúkrahúsið*

Ein dagføring av framhaldandi byggiætlanini fyri Landssjúkrahúsið varð herfyri framløgd fyri Trivnaðarnevnd Løgtingsins.

Dagførda byggiætlanin fevnir um tey øki á sjúkrahúsinum, sum enn ikki eru dagførd til nútíðartørvin, umframt ein nýggjan psykiatriskan depil. Ætlanin fylgir langtíðarætlanini fyri útbygging og um framhaldandi umvæling av Landssjúkrahúsinum, sum var sett í verk í 2005.

Tað nýskapandi við dagførdu byggiætlanini er, at lagt verður upp til, at alt verður bygt í eini samanhangandi eind niðanfyri verandi høvuðsbygning. Sí tekning.

Mett verður, at nógvir fyrimunir eru við hesum. Fakliga er hetta ein góð loysn fyri virksemið á sjúkrahúsinum, og fíggjarligir fyrimunir eru eisini við hesari ætlan.

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður, tekur væl ímóti dagførdu byggiætlanini og fer nú undir at fyrireika eina nýggja verklagslóg. Í viðmerking sigur landsstýrismaðurin:

“Eg haldi, at dagførda ætlanin hjá bygginevndini er sera áhugaverd. Nýggju ætlanirnar leggja upp til eina øðrvísi tíðarætlan enn verandi verklagslóg hevur lagt upp til, og tí er neyðugt við eini dagføring av verandi langtíðarætlan. Hetta má gerast í lóg, og fundurin við Trivnaðarnevndina gevur mær góðar vónir um, at politisk undirtøku verður fyri broytingunum”.

Eftir ætlan verður broytt verklagslóg borin í Løgtingið hesa tingsetuna.

Heilsumálaráðið 26. januar 2010

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: hmr@hmr.fo



Perspektiv sæð frá sjónum